

## Atlantsflog søguliga stórt virksemi

Partafelagið Atlantic Airways hevði aðalfund í gjár. Har kom fram, at virksemið í felagnum vaks nógv í 2006. So nógv, at tað ongantíð hevur verið størri. Sjálvur umsetningurin vaks úr 379,5 milliónum upp í slakar 519 milliónur krónur í 2006 – ein vøkstur uppá 139,4 milliónur ella 36,7 %. Størsti partin av vøkstrinum kemur frá virksemi uttanfyri Føroyar. Nakrar tillagingar í viðtøkunum vóru eisini samtyktar. Hesar eru gjørdar til tess at búgva felagið til skráseting á partabrævamarknaðinum. Somuleiðis var í gjár ein endaligur sáttmáli, um keyp av tveimum flogførum við Swiss, gjørdur.

## Skrímsl á Barnabókasavninum

Í samband við mentanarnáttina í Havn í morgin, verður tiltak á Barnabókasavninum. Birita Mohr lesur virðisløntu bøkurnar um stóra skrímsl og lítla skrímsl, og tey sum koma at lurta fáa møguleika at vinna eina skrímslabók. Tiltakið byrjar kl. 16.00 og er ókeypis.

# Systir og beiggi



*Tvær sólir hava føðingardag, og mong munnu leggja sær leiðina framvið Blómubrekku fyrrapartin leygardagin at gratulera føðingardagsbørnunum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Leygarmorgunin halda systkini Ann og Tórur í Puntabyrgi 45 og 40 ára føðingardag. - Ofta ringi eg til beiggja frá fartelefonini. So biði eg hann ringja meg upp, og tað ger hann altíð. So práta vit í telefon saman, sigur Ann**

HÁTÍÐARHALD
*Rigmor Dam*

Leygarmorgunin verður eitt stórt tjald sett upp í túninum hjá Dianu og Finn í Puntabyrgi, tá vinir, búfelagar og starvsfelagar hjá teimum báðum kendu systkjunum, Tórur (40) og Ann (45), eru vælkomin til opið hús í Blómubrekku.

- So nú er bert eftir at vóna, at veðrið lagar seg, sigur pápin, sum ikki hevur avdúkað fyri Ann og Tóri, hvat verður á skránni stóra dagin.

- Tað er eitt yvirraskilsi, siga tey bæði vaksnu børnini, sum eisini sjálvi hava boðið nógvum fólki í føðingardag.

### Krossar í gávu

Tað er ein errin Tórur, sum tekur ímóti heima í durinum í morgun. Hann hevur akkurát pakkað føðingardagsgávuna upp frá foreldrunum - ein vakur svartur og silvurlittur krossur í einari hálsketu.

- Eg havi leingi ynskt mær hendan krossin, sum eg havi sæð í 3'aranum í SMS, har eg ofta gangi og hyggi, sigur hann.

- Um eg verið nervøsur, so taki eg bara í krossin. So veit eg, at Harrin er hjá mær, sigur hann skilagóður.

Systurin Ann hevur eisini fingið ein kross í føðingardagsgávu í